Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

P/f Faroe Farming
Vágsvegur 41
Postbox 97
FO-900 Vágur

**Att.: Egill Steintórsson, stjóri**

**Tórshavn 12. november 2012**

Journal nr.: 12/00179-11
Viðgjørt: S.R:

**Avgerð um góðkenning eftir einfalda málsviðgerð**

Kappingareftirlitið fekk tann 25. oktober 2012 fráboðan um, at Sp/f Hjallur yvirtekur P/f Faroe Farming, sbrt. §16, stk. 1 í kappingarlógini. Fráboðanin var fullfíggjað og fekk tí gildi sama dag, sbrt. § 4, stk. 1 í reglugerð nr. 2 frá 20 juli 2012 um fráboðan av samanleggingum.

Yvirtøkan verður framd við, at Sp/f Hjallur keypir 51% av partapeninginum í P/f Faroe Farming frá Bakkafrost samtakinum. Heilt neyvt frá P/f Bakkafrost Sales og P/f Havsbrún. Keypið er liður í vanliga rakstrinum hjá Sp/f Hjallur, hvørs endamál er at eiga partabrøv og vera íløgufelag.

Sp/f Hjallur er íløgufelag og dótturfelag hjá P/f Tjaldur. P/f Tjaldur er millum størru íløgusamtøkurnar í Føroyum. Íløguvirksemið hjá P/f Tjaldur fer í størstan mun umvegis dótturfeløg, sum Sp/f Hjallur. Samtakið hevur tilvitað spjatt sínar íløgur út á ymisk vinnuøki. P/f Tjaldur eigur dótturfeløgini Sp/f Kerið, Sp/f Hjallur, P/f John Dam & co, Sp/f Kolan, Sp/f RM, Sp/f Lerkur, Sp/f Skríníð.

P/f Faroe Farming rekur alivinnu, smoltframleiðslu og sølu av laksi. P/f Faroe Farming var upprunaliga ogn hjá P/f Havsbrún, men gjørdist partur av Bakkafrost samtakinum í sambandi við at P/f Havsbrún varð yvirtikið av P/f Bakkafrost. Í sambandi við hesa yvirtøku skuldi góðkenning fáast frá m.a. Kappingarráðnum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Kappingarráðið setti ávísar treytir um framferð frameftir, meðan Heilsufrøðiliga starvsstovan setti treytir um frásølu av aliloyvum. Orsøkin til at P/f Faroe Farming nú verður selt, skal síggjast í sambandi við tær treytir, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan setti um frásølu av aliloyvum.

Talan er um eina yvirtøku, sum er fevnd av samanleggingarhugtakinum í § 13, stk. 1 í kappingarlógini, og umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum er omanfyri markvirðini í § 14, stk. 1, nr. 1 í kappingarlógini. Talan er tí um eina yvirtøku, sum kemur undir fráboðanarskylduna í § 16, stk. 1 í kappingarlógini.

Skálatrøð 20 · P.O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 35 60 40 · Fax +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Sambært teimum upplýsingum sum fráboðari er komin við, er talan um eina yvirtøku, sum er fevnd av § 3, stk. 1, nr. 3, litra a í reglugerð nr. 2 frá 20 juli 2012 um fráboðan av samanleggingum. Við grundarlag í teimum upplýsingum sum fráboðari er komin við, metir Kappingareftirlitið, at yvirtøkan ikki gevur orsøk til ivasemi, og hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna eftir einfalda málsviðgerð, sbrt. § 15, stk. 5 í kappingarlógini.

Góðkenningin er givin treytað av, at tær upplýsingar sum luttakandi fyritøkur hava givið eru rættar, sbrt. § 18a, stk. 3 í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
fulltrúi